# Vit kenna okkara ábyrgd

*Danska stjórnin kennir sína fíggjarligu ábyrgd í ríkisfelagsskapinum, og føroyingar varð ikki sleptir upp á fjall, sigur Jan Petersen, politiskur orðførar hjá Sosialdemokratunum*

EYÐUN KLAKSTEIN

Fleiri danskir politikarar úr ymsum flokkum halda, at tað er neyðugt at minka ríkisveitingina til Føroyar, tí føroyska samfelagið er so væl fyri búskaparliga.

Harafturat vilja tveir av landsstýrismonnunum, sum vóru til samráðingarnar í Forsætismálaráðnum hósdagin, verða við, at danski fíggjarmálaráðharrin, Mogens Lykketoft, segði, at verða liviumstøðurnar í Føroyum betri enn í Danmark, verður ríkisstuðulin tikin burtur – í einum um neyðugt.

Fíggjarpolitiski orðførarin hjá danska Javnaðarflokkinum, Jan Petersen, sum eisini er virkandi formaður í Føroyanevndini hjá Fólkatinginum, er ikki so avgjørdur, hóast hann ikki vil avvísa, at blokkstuðulin fer at minka.

**Tað veldst**

– Tað er ein prinsipiellur munur á at vera innanfyri ella uttanfyri ríkisfelagskapin. Velja føroyingar at loysa, so er greitt, at Føroyar mugu taka fulla fíggjarliga ábyrgd. Verða Føroyar hinvegin innanfyri ríkisfelagskapin, so fara vit at kenna okkara ábyrgd, sigur Jan Petersen.

Hann sigur seg ikki kunna gera nakrar serligar viðmerkingar til, um ríkisveitingin fer at falla burtur, sjálvt um Føroyar halda fram innanfyri ríkisfelagsskapin.

– Í løtuni samráðast vit við føroyingar um fullveldi, og har hevur landsstýrið fingið okkara greiðu boð um, hvussu vit ynskja ein búskaparliga skiftistíð, sigur Jan Petersen.

**Bíða eftir stjórnini**

– Vit skulu tillaga okkum eftir fíggjarligu umstøðunum innan fyri ríkisfelagsskapin, og tí kann ríkisveitingin verða regulerað, men tað er trupult at siga, hvussu tað verður við hesi veitingini í framtíðini, sigur Jan Petersen.

– Men eg skal sláa fast, at halda føroyingar fram innanfyri ríkisfelagsskapin, so fer danska stjórnin framhaldandi at kenna fíggjarliga ábyrgd í øllum ríkinum, sigur hann.

Politiski orðførarin hjá danska Vinstraflokkinum sigur, at flokkurin bíðar eftir einum útspæli frá stjórnini um ríkisveitingina.

– Eg dugi ikki at meta um, um ríkisveitingin til Føroyar skal minkast, men vit fara sjálvandi at taka støðu til tað, um eitt útspæl kemur frá stjórnini, sigur Ulla Tørnes.



*– Halda føroyingar fram innan ríkisfelagsskapin, so fer danska stjórnin at kenna fíggjarliga ábyrgd, sigur Jan Petersen, fíggjarpolitiskur orðførari hjá danska Javnaðarflokkinum*

## Løgtingsformaðurin til Kiel

Fríggjadagin fóru løgtingsformaðurin og kona hansara til Kiel at vitja sum gestir hjá landdegnum (landspartatinginum) í Slesvík-Holstein. Vitjanin varir í tríggjar dagar.

Hetta er ein árlig innbjóðing til Kieler-woche, ið er eitt slag av »ólavsøku«. Fundur er ein dag, og síðan verða útferðir gjørdar, har gestirnir fáa ymiskt at síggja og vita um Slesvík-Holstein.

Forumið er rættiliga stórt: umboð eru við fyri øll tingini í Eystursjóarlondunum, øllum Norðurlondum og fyri tingini í Føroyum, Grønlandi og Álandsoyggjunum.

Á fundunum verður eitt ávíst evni viðgjørt, og harumframt greiða umboðini frá týðandi politiskum viðurskiftum í heimlandinum. Í fjør og í fyrraárið greiddi løgtingsformaðurin frá fullveldisætlanini og samráðingunum við Bretland um undirgrundarmarkið.

Í ár fer hann at greiða frá samráðingarstøðuni um tey ríkisrættarligu viðurskiftini, frá undirgrundaravtaluni og fyrsta útbjóðingarumfari til leiting eftir olju.

Í døgunum frá 26. til 29. juni er Formansskapur Løgtingsins gestur hjá Formansskapi Fólkatingsins. Eisini hetta er ein árligur fundur, annaðhvørt ár í Danmark og annaðhvørt í Føroyum. Í fjør var Formansskapur Fólkatingsins í Føroyum.



*Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður fór saman við konuni til Kiel fríggjadagin*

Formansskapirnir hava fund ein dag, har teir greiða frá nýskipanum og broyttum mannagongdum í tingarbeiðinum hjá hvørjum øðrum. Harumframt verða útferðir gjørdar.

Við á ferðini eru limirnir í formansskapinum við hjúnafelaga og umboð fyri umsitingina hjá Løgtinginum. Í Formansskapinum eru: Finnbogi Ísakson, formaður, Eyðun Viderø, 1. næstformaður, Vilhelm Johannesen, 2. næstformaður, og Edmund Joensen, 3. næstformaður.

Dagarnar 1. og 2. juli hava íslendingar stórt 1000 ára kristnihátíðarhald. Løgtingsformaðurin, kona hansara og skrivstovustjóri Løgtingsins verða við til hátíðarhaldið.

## Ríkisveitingin skal tryggja vælferð í øllum ríkinum

*Formenninir í stóru andstøðuflokkunum kenna seg fullvísar í, at danir fara ikki at avtaka ríkisveitingina uttan víðari*

EYÐUN KLAKSTEIN

Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin stúra ikki fyri gongdini, nú danskir fjølmiðlar eru farnir at rógva fram undir, at danska stjórnin ætlar at taka eina búskaparliga uppgerð við føroyingar – við ella uttan fullveldi.

– Ríkisveitingin skal tryggja, at allir partarnir av ríkinum hava somu vælferðina, men hon er ikki uttan víðari ein varðandi veiting. Danski statsministarin hevur staðfest tí modernaðu útgávuna av veitingini, sum er at hon er tengd at búskaparligu støðuni í Føroyum, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum.

Leiðarin í hinum stóra andstøðuflokkinum, Edmund Joensen, sigur, at tað eru loysingarfólk sum royna at uppspinna eina søgu um, at blokkstuðulin skal falla burtur.

– Blokkstuðulin kann regulerast, men hann fer altíð at hava eitt ávíst støði, og tað er sum nátt og dagur at verða innanfyri ella uttanfyri ríkisfelagsskapin, sigur hann.

– Landsstýrið roynir at kvetta við Danmark, so vit missa øll rættindi og vælferðina, meðan vit eru sannførd um, at innanfyri ríkisfelagsskapin kunnu vit tryggja føroyska samfelagnum vælferðina og livistøðið, sum vit hava í dag, sigur formaður Sambandsfloksins.





**Forsøma týðandi uppgávur**

Jóannes Eidesgaard sigur, at málið hjá føroyska samfelagnum eigur at verða at hava ein sjálvberandi búskap uttan ríkisveiting, men spurningurin er, hvørjum leisti arbeiðast skal eftir.

– Vit vita, at ríkisveitingin kann minka, um livistøðið í Føroyum fer upp um tað danska, men tað er einki vandamál í tí. Tað er tað sama, um vit finna olju, tí í avtaluni um undirgrundina frá 1992 stendur, at um føroyingar fáa stórar inntøkur av oljuni, so kunnu samráðingar takast upp um ríkisveitingina, sigur Jóannes Eidesgaaard.

Jóannes Eidesgaard heldur, at danir byggja sínar metingar av føroyska búskapinum á skeiv tøl, tí tað avlopið, sum er at finna á fíggjarlógini, er ikki rættvísandi.

– Landsstýrið roynir at prógva, av vit hava ein sjálvberandi búskap, men tað gera teir við at forsøma týðandi uppgávur. Fleiri av samfelagstænastunum eru illa fyri og koyra uppá pumpurnar, sigur formaður Javnaðarfloksins og sipar til støðuna í millum annað heilsuverkinum og samferðsluni.

Hann heldur, at fólk eiga ikki at gloyma, at ríkisfelagsskapurin er so nógv annað enn pengar. Tað verður roynt at gera ríkisfelagsskapin til tað sama sum ríkisveiting, men ríkisveitingin er bara ein partur av ríkisfelagsskapinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

**Skyldurnar galda báðar vegir**

Edmund Joensen sigur, at ríkisfelagsskapurin er ein spurningur um rættindi og skyldur.

– Taka vit loysing, missa vit øll rættindini í ríkinum. Halda vit fram í ríkisfelagsskapinum, so hava danir eina skyldu at tryggja somu liviumstøður í øllum ríkinum, sigur hann.

– Og tað er galdandi báðar vegir. Um føroyingar fáa stórar inntøkur av oljuni og gerast nógv ríkari enn danir, so hava føroyingar somu búskaparligu skyldurnar mótvegis ríkisfelagsskapinum, sum danir hava tað.

Edmund Joensen heldur, at tað er eingin vandi fyri at missa ríkisveitingina sum er. Hann sigur, at hetta hevur statsministarin sjálvur gjørt greitt mótvegis føroyingum, og søgurnar um, at stuðulin úr Danmark skal falla burtur, eru søgur, sum loysingarfólkini uppspinna.

– Tað besta fyri Føroyar er at standa saman við dønum og grønlendingum um ríkisfelagsskapin, heldur formaður Sambandsfloksins.



# M‡tan um d‡rar fer›ase›lar

*FLOGFER‹SLA. Ver›ur teinalongdin á flogtúrinum millum Føroyar og Danmørk samanborin vi› fer›ase›laprísin, ber til at sta›festa, at ta› kortini ikki er so d‡rt at flúgva millum londini bæ›i*

HØGNI MOHR

- Mann sleppur langt inn í Afrika fyri pengarnar, sum ein fer›ase›il millum Føroyar og Danmørk kostar!

Hendan sta›festingin og a›rar av sama slagi eru javnan at hoyra frá atfinningarsomum føroyingum, sum ætla sær á flog vi› Atlantsflogi ella Maersk. Eisini útlendingar, i› umhugsa at fara til Føroya at fer›ast, gera vart vi› ónøgd sína vi› fer›ase›lakostna›in.

**Bíligari teinur**

Ta› ver›ur altí› ein metingarspurningur hjá vi›skiftafólkum, um prísirnir eru høgir ella ikki Men uppáhaldini um d‡ru fer›ase›larnar eru í veruleikanum ikki heilt rættar. Ver›ur kostna›urin samanborin vi› longdina á teininum, ber til at sta›festa, at floglei›in millum Danmørk og Føroyar er uppi í teimum bílagaru.

**D‡rari til London**

Prísurin millum Keypmannahavn og London, sum er lei›in, har hin størsta kappingin er millum flogfeløg, er rættiliga fitt hægri enn tann millum Keypmannahavn og Vágar. Fyri hvørja ensku míl er kostna›urin 6,09 krónur fyri einvegis fer›ase›il til London. Sami fer›ase›il til Føroya kostar 2,56 fyri mílina. Ein APEX-fer›ase›il millum London og Keypmannahavn kostar 2,45 fyri mílina, me›an prísurin millum Keypmannahavn og Føroyar er 1,50 fyri mílina. Lægstu átaksprísirnir á lei›unum bá›um er á lei› hinir somu fyri mílina. Teinurin millum Keypmannahavn og London er o.u. 30 prosent styttri enn í Vágar.

**Bíligari til Føroya**

Vanligir einvegis fer›ase›lar er hitt sama sum sonevndar opnir fer›ase›lar. Ta› eru serliga vinnulívskundar, i› keypa hesar fer›ase›lar.

Talvan vi› útvaldum fer›amálum gevur ábendingar um, at longri teinurin er, jú bíligari hvør flogin míl. Men kortini sæst, at lei›in millum Føroyar og Danmørk er uppi í teimum allar bíligastu, sammett vi› a›rar vælkendar teinar.

| | VANLIGUR einvegis | | | APEX fram/aftur | | | ÁTAKSPRÍSIR fram/aftur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Ein-vegis | Strekki í míl | Prísur pr. míl | Ein-vegis | Strekki í míl | Prísur pr. míl | fram/aftur | Strekki í míl | Prísur pr. míl |
| Keypmannahavn - London | 3615 | 594 | 6,09 | 2905 | 1188 | 2,45 | 1000 | 1186 | 0,84 |
| Keypmannahavn - Venedig | 4840 | 695 | 6,98 | 4175 | 1390 | 3,00 | 2450 | 1390 | 1,76 |
| **Keypmannahavn - Føroyar** | **2130** | **836** | **2,56** | **2500** | **1672** | **1,50** | **1480** | **1672** | **0,89** |
| Billund - Amsterdam | 3120 | 296 | 10,54 | 2695 | 592 | 4,55 | 1500 | 592 | 2,59 |
| Billund - Brüssel | 3510 | 386 | 9,09 | 2100 | 772 | 2,72 | 1250 | 772 | 1,62 |
| Billund - Dublin | 4455 | 636 | 7,00 | 2945 | 1272 | 2,32 | 2200 | 1272 | 1,73 |
| Billund - París | 4025 | 552 | 7,29 | 3415 | 1104 | 3,09 | 1900 | 1104 | 1,72 |
| Keypmannahavn - Bergen | 3660 | 423 | 8,65 | 2200 | 846 | 2,60 | 1850 | 846 | 2,19 |
| Keypmannahavn - Stavanger | 3145 | 346 | 9,09 | 2200 | 692 | 3,18 | 1850 | 692 | 2,67 |
| Keypmannahavn - Oslo | 2815 | 322 | 8,74 | 1990 | 644 | 3,09 | 1300 | 644 | 2,02 |
| Keypmannahavn - Trondheim | 3400 | 546 | 6,24 | 2510 | 1090 | 2,30 | 1850 | 1090 | 1,70 |

*Kelda: Maersk*

# Fimm handtøkur

*EYSTANSTEVNA. Løgreglan í Runavík er nøgd nú eystanstevnan 2000 er farin aftur um. Tvey fólk vór›u tikin fyri at koyra full, og tr‡ noyddust at sova rúsin av sær í klivanum*

HØGNI MOHR

Vakthavandi á løgreglustø›ini í Runavík er stak væl nøgdur eftir eystanstevnuna, sum var um vikuskifti›. Óvanliga nógv fólk vóru í Runavík leygarkvøldi›, men kortini fór alt fri›arliga fram. Dagurin byrja›i annars í oysandi regni, men um tveytí›ina sleit í. Vakra ve›ri› helt sær alla náttina. Leygarkvøldi› var› ein bilførari handtikin fyri rúsdrekkakoyring og løgreglan vakti nøkur fólk, sum vóru fallin av á gøtuni.

Sambært løgregluna hildu fólk sær á gleimi til klokkan var farin av sjey sunnumorgun. Seinnapartin sunnudag var ein bilførari afturat tikin fyri rúsdrekkakoyring og um kvøldi› gistu tr‡ fólk á stø›ini, tí tey vóru ov full at liggja undir opnum himli.

Løgreglan hev›i ongar trupulleikar av teimum fimm fólkunum, i› vóru handtikin. Handtøkurnar og avgrei›slan av málunum millum løgreglu og borgarar fóru fram uttan stórvegis hóvasták, ver›ur sagt av stø›ini í Runavík.



*Ta› gekk fridarliga fyri seg á eystanstevnu um vikuskifti›*


